# Carli kallar til skammleyst Skjaldrating

**Rithøvundurin Carl Jóhan Jensen kallar til Skjaldrating, nú hansara skammleyst politisku og ómorgunandaktsligu skjaldur, sum hann nevnir tey, skulu takast upp á fløgu**

## Mentan

Anna V. Ellingsgaard
blaðkvinna
anna@sosialurin.fo



Tað verður ikki loyvt at rópa ella svara til, tá Carl Jóhan Jensen fer at lesa síni nýskjaldur upp í annaðkvøld á Gamla Meiarínum.

Men annars skulu fólk ikki halda seg aftur, tí ljóðið av teimum skal brúkast sum botnur, nú nýskjaldrini hjá rithøvundanum verða fest á fløgu, sum kemur út til jóla.

Afturfyri ómakin lovar Carl Jóhan Jensen áhoyrarnum eina røð av nýskjaldrum, sum eru skammleyst politisk, ólurtaravinarlig, pásetlig, ómorgunandaktslig og sum ongin rættsiktaður føroyingur átti at lagt oyra til.



*Áhoyrararnir slepp a upp í part, nú Carl Jóhan Jensen, rithøvundi, fer at festa síni tiltiknu nýskjaldur á fløgu*

### Leggja upp til samspæl

Tey, ið hava fylgt við virkseminum hjá Carl Jóhan Jensen seinnu árini, hava uttan iva hoyrt okkurt av hansara eftirhondini tiltiknu nýskjaldrum, sum rithøvundurin millum annað hevur lisið upp á G!, á Doktaragrund á ólavsøku og í Føroyahúsinum. Ofta hava skjaldrini verið skrivað til høvið og nýggj eru komin afturat alla tíðina. Í annaðkvøld fer Carl Jóhan Jensen so fyri fyrstu ferð at lesa skjaldrini upp í síni heild fyri áhoyrararum, nú skjaldrini skulu takast upp á fløgu.

Hetta er ikki fyrstu ferð Carl Jóhan Jensen gevur fløgu út við sínum tekstum, men klókur av royndum frá eitt nú upptøkunum til fløguna við upplestri av yrkingunum í »September í bjørkum, sum kanska eru bláar«, vil hann nú hava áhoyrarar at vera til staðar undir upptøkunum.

- Eg helt beinanvegin, at okkurt manglaði á tí fløguni. Eg saknaði eitt mótspæl ella samspæl av onkrum slag við eina áhoyrarafjøld, sum kundi givið upplestrinum meir lív, sigur Carl Jóhan Jensen, sum heldur, at upplestur uttan áhoyrarar kennist eitt sindur at lesa nótar uttan at hoyra tónleikin

Eisini leggja skjaldur í allar mátar upp til eitt samspæl við áhoyrarnar, minnir rithøvundurin á

- Í so máta líkjast tey kvæðunum, har framførari og 'áhoyrarar' geva hvørjum øðrum eitt slag av mótspæli, sum fær framførsluna at ganga upp í eina eind, sigur Carl Jóhan Jensen.

### Áhugavert brongl

Tað var til ein fyrilestur um skjaldratraditiónina, at Carl Jóhan Jensen fekk hugskotið at tríva aftur hesa eftirhondini heldur gulnaðu føroysku hevdina, sum hann tekur til.

- Eg helt meg hava eitt innihald, sum egnar seg væl at verða miðlað í skjaldralíki. Listarliga er skjaldrahevdin eisini rættiliga áhugaverd at kanna nærri, netupp tí fólk ikki altíð hava havt ta stóru listarligu virðingina fyri skjaldrunum. Tí hava tey eisini kent seg træls til at broyta og brongla skjaldrini, so tað ofta er rættiliga ivasamt, hvat orðini í grundini merkja, sigur Carl Jóhan Jensen.

Sum dømi nevnir hann kenda skjaldrið »Rura, rura barnið«, har reglan 'tak um legg og slá í vegg' oftast verður fatað sum ein í so harðligur máti at fáa barnið at tiga. Men um vit hugsa okkum, at orðið 'legg' er ein bronglað útgáva av orðinum 'leika', verður dámurin heldur hugnaligari.

- Tá verður merkingin, heldur at onkur roynir at ugga barnið við at banka eina leiku móti vegginum, so tað veit, at ein vaksin er til staðar, greiðir Carl Jóhan Jensen frá.

Í øllum førum hava skjaldrini nakrar málsligar møguleikar, sum tú ikki finnur aðrastaðni. Serliga tá tað ræður um at gera heimagjørd orð og í aðrar mátar at brongla málið uttan at merkingin verður skeiv ella málið beinleiðis avskeplast.

Hvussu innihaldið í nýskjaldrunum hjá Carl Jóhan Jensen kann gera sær dælt av hesum møguleikum, hoyrdu eitt nú fleiri dømi um á G! í 2007. Her er til dømis brot úr hansara enduryrking av skjaldrinum »Eg setti meg í Gøtulíð« við innihaldsligum íblástri úr Visjón 2015 bóklinginum »Mál og Vegir«.

*valdið dansar deiga*
*sjálvsmenningin feiga;*
*alskyns javnar lúrintút*
*fólksins ognir inn og út;*
*fittar gentur, stórir dreingir*
*hugsa væl og leingi,*
*tjóð skal fáa nýggjan skógv*
*annan hæl, aðra tá,*
*fimtan borgir handan sýn,*
*tjúgu skip og kápu blá,*
*hartil spæl og gullingrýn,*
*ongan ampa,*
*onki brýggj;*
*Hey, hulladihey,*
*eingin neyð,*
*eingin neyð.*

Skjaldratingið verður sett á Gamla Meiarínum leygarkvøldið klokkan 19. Upplesturin verður tikin upp á fløgu, sum kemur út til jóla, tá bók við nýskjaldrunum hjá Carl Jóhan Jensen eisini kemur út